Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Talulæra og bústovnatilboð til fólk við seinheilaskaða og demens

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at seta í starv fleiri talulærarar, nú lógin um almanna trygd og tænastur (vælferðarlógin) er komin í gildi?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at eyðmerkja tørvin og samskipa útboðið við taluvenjingum og viðlíkahaldsvenjingum fyri fólk við seinheilaskaða og demens?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at veita fleiri bústovnatilboð til fólk við seinheilaskaða og demens?
4. Samskiftir landsstýrismaðurin við kommunala geiran um samstarv av tilboðum á økinum?

Viðmerkingar:
Fyri knøppum ári síðan hevði undirritaði ein líknandi grein 52 fyrispurning til landsstýrismannin um at fáa sett fleiri talulærarar í starv til tey, sum krevja áhaldandi talulæru.[1]

130 fólk verða rakt av seinheilaskaða hvørt ár. Fleiri av hesum missa samskiftisførleikan, men kunnu við venjingum vinna hann aftur. Fleiri vinna arbeiðsførleikan aftur, um viðlíkahaldsvenjingarnar halda fram eftir sjúkralegu. Samskiftisevnini eru grundarlagið undir einum virknum sosialum lívi. Á Landssjúkrahúsinum er eitt tilboð, har sjúklingar fáa uml. 10 taluvenjingartímar, men so steðgar tað har. Ofta noyðast avvarðandi at keypa talulæruhjálp, soleiðis at venjingin kann halda fram. Tað almenna veitir avmarkaða taluhjálp til fólk omanfyri 18 ár.

Avvarðandi at sjúklingum við seinheilaskaða og demens eru ofta fremsta hjálpin. Ein sjónvarpssending í KVF herfyri lýsti eisini ítøkiliga tørvin á økinum.[2]

Talulærarar verða brúktir innan onnur øki í almenna geiranum, men einamest til børn og ung. Fleiri útbúnir talulærarar eru klárir at taka við, um økið verður raðfest hægri og peningur játtaður á fíggjarlógini.

Tørvurin á bústovnatilboðum er eisini stórur. Her eru einstakar ítøkiligar ætlanir.

Óvist er tó, um øll í landinum fáa somu møguleikar, tá tað kemur til raðfesting av tilboðum.

Landsstýrismaðurin hevur lovað batar. Fyri at fáa greiðu á, hvat ítøkiligt er vorðið betri á hesum øki seinasta árið, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. apríl 2021

Jóhannis Joensen

[1] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=34
[2] https://kvf.fo/dokumentarurin?sid=122593